# Hermund og Alvi lagt saman

**»MENTA – skrásettir grannskoðarar spf.« er navnið á nýggju grannskoðarafyritøkuni, sum er úrslitið av eini samanlegging av Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen og Sp/f Alvi Nielsen**

FYRITØKA

Hermund Jacobsen og Alvi Nielsen, skrásettir grannskoðarar, hava lagt virksemið saman í eina fyritøku sum nú eitur »MENTA – skrásettir grannskoðarar spf.«

"Vit hava tikið hetta stigið fyri at brynja okkum betri út og fyri at kunna veita kundum okkara eina enn betri tænastu", siga teir báðir í stuttari viðmerking, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen varð stovnað 1. november 1987 og hevur sostatt 20 ár á baki. Sp/f Alvi Nielsen varð stovnað 21. november 2005. Hermund og Alvi hava báðir drúgvar royndir sum grannskoðarar.

Alvi hevur starvast tilsamans 23 ár sum grannskoðari, harav 20 ár hjá P/f Grannskoðaravirkið Inpact, og sløk trý ár sum sjálvstøðugur. Hermund hevur tilsamans arbeitt sum grannskoðari í 25 ár, harav fimm ár hjá Rasmussen og Weihe og tey 20 sum sjálvstøðugur.

Í dag starvast tilsamans 9 fólk hjá »MENTA – skrásettir grannskoðarar«, sum er vorðið eitt av teim størru grannskoðaravirkjunum í landinum.

**mg**



*Hermund Jacobsen og Alvi Nielsen framman fyri virkisbygninginum í Jónas Broncksgøtu*

# Víkafé – nýggj kafé í Klaksvík

**Fríggjadagin 15. februar læt ein nýggj kafé upp í Klaksvík. Í hesum sambandi var móttøka í kaféini, har m.a. livandi tónleikur var á skránni**

MÓTTØKA

*Myndir: Joan Abrahamsen*

Nýggja kaféin í Klaksvík hevur fingið navnið Víkafé. Tað eru systrarnar Susan Hansen og June Jacobsen, sum hava tikið stig til nýggju kaféina, sum heldur til í somu húsum restaurant Hereford á Klaksvíksvegi 45.

Í Víkafé ber til at fáa nógvar ymiskar rættir og sjálvandi eitt breitt úrval av kaffi og øðrum drykkivørum. Eisini er ein lítil pallur gjørdur við ljóðanleggi, har livandi tónleikur kann verða framførdur. Undir móttøkuni framførdi ungi havnarmaðurin Heri Olsen, sum eisini kemur at framføra komandi leygarkvøld.

Susan og June, sum hava arbeitt saman í eina tíð við cateringfyritøkuni Matarlist, siga at fólk hava tikið væl undir við kaféini, sum er eitt stað har fólk kunnu koma inn at njóta góðan mat og drykkivørur í hugnaligum umhvørvi. Kaféin er sera hugnalig við t.d. bæði nýggjum og gomlum møblum, sum seta sín serliga dám á hølini. Ætlanin er eisini at skipa fyri ymiskum tiltøkum í kaféini, sum er opin frá kl. 12 til 23 frá mánadegi til hósdag og fríggjadag og leygardag er opið frá kl. 12 til klokkan eitt um náttina.

**mg**



*Susan Hansen og June Jacobsen í nýggju kaféini*



*Kaféin er sera hugnalig við bæði nýggjum og gomlum møblum*



*Frá móttøkuni, Símun Gullaksen frá Føroya Bjór*



*Frá móttøkuni f.v.: Maiken Steinberg, leiðari á Norðoya Kunningarstovu, Susan Hansen, frá Víkafé, Rani Nolsøe, leiðari í Íverksetarahúsinum, og June Jacobsen frá Víkafé*

---

†

Við hesum verður kunngjørt, at elskaða mamma, omma, langomma, oldurommma og vermamma okkara

**Súsanna Malena Poulsen**
**Eiði**
vanliga nevnd Sannelena á Lofti
ættað úr Tjørnuvík

andaðist týsdagin 19. februar, 99 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Mizpa leygardagin
23. februar kl. 12.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Herdis, Selma, Koba, Sigmund, Svenning og Jónsvein**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Hansen**
Norðragøta

andaðist og varð jarðað.
Vit takka tykkum øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Vit takka somuleiðis fyri blómur, kransar og gávur til Gøtu kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Olea, Finnbogi og Tróndur**

---

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sonja Margreta Olsen**
Miðvágur

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Øssur Berghamar, sum trúliga vitjaði hana ta tíð, hon var á Ríkissjúkrahúsinum.
Tøkk til David Johannesen, prest, fyri vøkur og troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Diabetisfelag Føroya.
Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og øll tykkum, sum hjálptu so væl til við ervinum.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldar stað her á foldum.

*Familjunnar vegna*
**Hans Jacob, Marianna, Christian og Jónfinn**